

# Samkomubladid fyri juni

# 2017



KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar





www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



**Gud gloymir!**

Tóri Højgaard

Visti tú, at Gud gloymir? Hóast tað er ein ávís andsøgn í, at ein alvitandi Gud kann gloyma, so er tað satt. Gud velur at gloyma syndir okkara.

Heb 8:12: “Tí Eg skal vera órættvísi teirra náðigur og ikki longur minnast syndir teirra."

Hóast vit menniskju gloyma nógv, so hava vit lyndi til at minnast syndir. Bæði okkara egnu og – kanska serliga – tær hjá øðrum. Tí síggja vit bæði okkum sjálv og medmenniskju okkara í ljósinum av tí, vit hava gjørt.

Men soleiðis er Gud ikki. Sum Hebr. 8:12 sigur, so er Hann órættvísi okkara náðigur og minnist ikki longur syndir okkara. Nøkur vers frammanundan sigur Gud, at Hann vil gera ein nýggjan sáttmála við fólk Sítt. Tað er í ljósinum av hesum nýggja sáttmála, at Hann sær okkum í dag.

Vit vita, at øll menniskju synda. Men gleðiboðskapurin er, at Jesus hevur goldið fyri allar okkara syndir, og tær eru skolaðar burtur í blóði Hansara.

Hin rættvísi Gud kann í dag siga, at Hann minnist ikki syndir okkara. Tí at ein dag fyri langari tíð síðani, mintist Hann tær og revsaði tær allar á krossinum.
Í dag sær Gud okkum tí uttan syndir okkara, og vit kunnu við dirvi fara fyri trónu Guds og liva í Hansara rættvísi.

# Skrá fyri juni

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 5. juni | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 6. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 10. juni | kl. 20.00: | AWAKE við Búgva Olsen |
| Sunnudagur | 11. juni | kl. 11.00: | Morgunmøti við Búgva Olsen<br>Sangluttøka við Kirstin og Bodil |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 12. juni | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 13. juni | kl. 10.00: | bønardagur |
| Leygardagur | 17. juni | kl. 20.00: | AWAKE kafékvøld |
| Sunnudagur | 18. juni | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj<br>Sangluttøka við Odu á Fríðufløtum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 19. juni | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 20. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 24. juni | kl. 20.00: | AWAKE við YWAM |
| Sunnudagur | 25. juni | kl. 11.00: | Morgunmøti við YWAM Breyðbróting |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 26. juni | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 27. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 1. juli | kl. 20.00: | AWAKE við Ara Langgaard |
| Sunnudagur | 2. juli | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ólavi Jacobsen<br>Innsavnan av tíggjund av heiløgum gávum<br>Sangluttøka við Oasubrøðrunum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 3. juli | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 4. juli | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 8. juli | kl. 20.00: | AWAKE við Ingibjørn Royðutoft |
| Sunnudagur | 9. juli | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku<br>Sangluttøka við ZAMAR |












# Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592

Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606

Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584